# Lítla jólahúsið í Sørvági

**Sørvingar eru í jólahýri. So góðum, at kommunan hevur gjørt eitt heilt hús um til jólahús**

JÓLAHÝRUR
*Edvard Joensen*

Tey hava eitt jólahús í Sørvági. Eitt heilt fitt lítið hús, sum stendur í gomlu bygdini í Sørvági. Eitt sindur burturgoymt kanska mitt í einum trunka av húsum. Men soleiðis standa gomul hús í gomlum bygdum ofta.

Sørvágs Kommuna hevur ognað sær eini av eldru húsunum í bygdini. Fitt lítil træhús við flagtekju, sum sett eru í stand og rættiliga hugnað um nú til jóla.

Inni eru jól. Tað er eingin í iva um, sum inn kemur. Her eru jól í hvørjum rúmi, hóast tey ikki eru so nógv, sum tey vanliga eru í nýggjum húsum í dag.

Og øll sleppa inn, siga tey, sum standa fyri hesum hugnaliga tiltakinum i Sørvági. Tí húsið er opið fyri almenninginum hvønn sunnudag í adventini. Seinnapart. Og so er sjálvandi eisni opið tann dagin, Vágatunnilin hevur føðingardag. Tað er tann 10. desember, tá frítt er at koyra gjøgnum tunnilin.

Ongum nýtist at fara við tóman munn út aftur úr jólahúsinum í Sørvági. Sum tey plaga at siga, so vilja tey ikki, at fólk skulu bera jólini útaftur. Boðið verður kaffi, holukøkur og slíkt, sum vnaliga er at fáa, tá ein vitjar fólk á jólum.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Um kvøldið minni vindur av vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi av útsynningi og regn, seinnapartin av vestri og ælingur. partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið lækkar hann niður í sunnan og regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, týskvøldið minni vindur. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 6 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷1 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 976 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/12 kl. 06[00]–02/12. 06[00]. Hitin í gjár: 3,0°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,1 mm – mált frá 01/12 kl. 06[00]–02/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 2,1 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG




12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

26. november: Fullmáni
30. november: Mánin longst frá jørðini
5. desember: Seinna kvarter
11. desember: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. des | 11.14 | 23.34 | 10.14 | 22.34 | 10.29 | 22.49 | 00.53 | 13.14 | 01.53 | 14.14 | 09.29 | 21.49 | 08.29 | 20.49 | 11.29 | 23.49 | 00.08 | 12.29 | 10.59 | 23.19 | — | 12.14 |
| 4. des | 11.54 | — | 10.54 | 23.26 | 11.09 | 23.41 | 01.34 | 13.54 | 02.34 | 14.54 | 10.09 | 22.41 | 09.09 | 21.41 | — | 12.09 | 00.49 | 13.09 | 11.39 | — | 00.34 | 12.54 |
| 5. des | 00.26 | 12.59 | 11.59 | — | - | 12.14 | 02.26 | 14.59 | 03.26 | 15.59 | 11.14 | 23.46 | 10.14 | 22.46 | 00.41 | 13.14 | 01.41 | 14.14 | 00.11 | 12.44 | 01.26 | 13.59 |
| 6. des | 01.31 | 14.03 | 00.31 | 13.03 | 00.46 | 13.18 | 03.31 | 16.03 | 04.31 | 17.03 | — | 12.18 | 11.18 | 23.37 | 01.46 | 14.18 | 02.46 | 15.18 | 01.16 | 13.48 | 02.31 | 15.03 |

5 707265 100050 >